# Oljuting í Sjónleikarhúsinum



*Fýra av nevndarlimunum í Oljutinginum leggja seinastu hond á fyrireikingarnar til fundin í Sjónleikarhúsinum*

*Mynd Jens Kr. Vang*

PALLBORÐFUNDUR

Undir heitinum "Til Gaman og Álvara" yvir pallinum í Sjónleikarhúsinum fara umboð fyri føroyskt vinnulív, almennar stovnar, fjølmiðlar oo. í kvøld at røða um Føroyar ár 2006 við atliti til eina komandi oljuvinnu.

Tað er Oljutingið, sum skipar fyri tiltakinum, ið er fyri limir felagsins. Evnini á fundinum verða vinna og búskapur við atliti til vinnupolitikk og samfelagsárin og mentan við atliti til førleika og tilfeingi.

Við pallborðið, sum snýr seg um vinnu og búskap sita Jørn Astrup Hansen, Herman Oskarson og John Eli Olsen og í pallborðinum, sum snýr seg um samfelagsárin og mentan sita Halgir W. Poulsen, Meinhard Jacobsen og Jan Müller.

Pallborðaluttakararnir fáa 5 min. til hvørt innleggið. Eftir tað verður alment kjak. Orðstýrari er Petur Even Djurhuus, advokatur.

Umleið 100 fólk hava teknað seg til tiltakið men verður upplýst frá Vinnuhúsinum, at fólk kunnu tekna seg eisini mikudagin. Tiltakið byrjar klokkan 19, tá forkvinnan í Oljutinginum, Ingvør Nolsøe setur fundin.

## VIÐMERKINGAR

# Hví so firtin ?

**Trygvi F. Guttesen**
*Tórshavn tann 9.apríl 2002*



Ì tveimum oddagreinum í Sosialinum ávikavist tann 5. og 6. apríl roynir Javnaðarflokkurin at ilnast um Sambandsflokkin. Hví kvetta brýr, nú øll rópa eftir samstarvi heldur enn konfrontatión ?

Teir skriva, at fyri Javnaðarflokkin er avgerandi at fáa fólk at skilja, at hvørki samband ella fullveldi er nøkur gongd leið. Sera løgin stafesting tí sum øllum kunnugt merkir samband samríki og fullveldi loysing. Javnaðarflokkurin vil sostatt hvørki hava samríki ella loysing.

Nakað annað, sum eisini kennist líka løgið, er tá skriva verður, at teir heldur enn samríki ella loysing, vilja hava eina miðvísa leið fram móti størri sjálvbjargni og sjálvsræði.

Er tað nakar, sum til hetta valið veruliga hevur víst á og skriva um tørvin á eini miðvísari leið fram móti størri sjálvbjargni og sjálvsræði, ja so eru tað júst Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin.

Men aðalmunurin millum flokkarnar er, at Sambandsflokkurin kennur seg sannførdan um, at vit best røkka nevnda tørvi í verandi ríki, meðan Tjóðveldisflokkurin hinvegin heldur seg koma skjótari á mál við at loysa.

Javnaðarflokkurin sigur seg vilja hava eina ríkisrættarliga loysn innan fyri ríkisfelagsskapin, men skrivar nú í síni oddagrein 6. apríl, at tað ringasta, sum kann henda fyri land og fólk er ein stórur Sambandsflokkur og ein stórur Tjóðveldisflokkur, har tað als ikki ber til at reka ein skilagóðan politikk.

Slík framhaldandi trampan millum samríki ella loysing møðir veljaran og gevur góðan vind í seglini hjá Tjóðveldisflokkinum. Ynskja vit veruliga eina loysn innanfyri ríkisfelagsskapin, er alneyðugt at samríkisflokkarnir - Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og meginparturin av Fólkaflokkinum halda somu kós.

Ivaleyst hevði Javnaðarflokkurin fingið størri undirtøku, um hann hevði verið meira støðufastur í ríkiseindini. Politiskur ivi skapar bara ótryggleika.

# Politikkur og várróður

**Hans J. Hermansen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymi*



Nógvur bátur hevur verið á Norðhavinum eina tíð, og væl hevur gingið við fiskiskapinum. Men tíverri hevur prísurin verið út av lagi vánaligur, og nógvir eru farnir aftur til hús og hava mynstrað av. Tað er væl skiljandi, tí hetta er tíðin, ið skuldi bjargað teimum árið. Eingin tímir at slíta seg upp fyri hungursløn.

Men aðrir eru meiri áhaldandi, hava longu fiskað leingi og royna um alt landið. Hesir útróðrarmenn hava fingið fiskidagar, egna við valagni og eru altráðir at fáa nakrar murtar. Her er eingin undirmálingur, bara hon ella hann er 18 ár ella eldri. Roynt verður við øllum reiðskapi, í sjálvdrátti, og sælur er hann, sum fær kenn og syftir nakrar fiskar. Fiskidagarnar fara at fækka, og summir hava longu brúkt nógvar, and sperran er burtur og einki gø er, sum nívir. Nú er lag á manni at fiska, tað sum eftir er av fiskidøgunum.

Hesir stertarnir, ið verða fiskaðir, verða landaðir umborð á móðurskip, eini seks í tali, og ymisk til støddar. Okkurt reiðarí gjørdi ikki skipið út í ár, men bíðar til næstu ferð, egnt verður við valagni. Onnur móðurskip eru stór og góð, bjóða gott valagn og bjarta framtíð.

Sjálvur havi eg fingið nakrar fiskidagar við einum róðrarbáti. Sleppi bara at fiska í Suðurstreymoyar valdømi. Móðurskipið er lítið, kanska tað minsta í landinum. Reiðaríið er lítið, men tað er sterkt og álítandi, og sáttmálin er góður - fyri fiskin. Hann verður allur sleptur leysur eftir 30. apríl og sleppur tá aftur at avgera, hvønn reiðskap honum dámar best, næstu ferð egnt verður við valagni.

Sjálvur havi eg fingið eina hondsnellu og havi hongt nakrar beituhúkar á dorgina. Niðasta beitan er um sjálvstýri, ein snøgg og eggjandi beita, sum er hvít, blá og reyð. Onnur beitan er um eldra- og sosialpolitikk. Triðniðjast beitan við ungdóms- og skúlapolitikki. Ferðsluviðurskifti og samferðsla fáa eisini eina beitu, somuleiðis heilsuverkið og røktin. Fíggjarpolitikkur og yvirtøkur mugu eisini havast í huga, skattapolitikkur og arbeiði, samfelag og mentan. Greinar mínar, sum verða stuttar, fara altso at snúgva seg um hesi mál (raðfylgjan er tilvildarlig og ikki raðfest):

- Sjálvstýri við skili
- Ellis- og røktarheim
- Ungdómur og útbúgving
- Fíggjarviðurskifti og yvirtøkur
- Skattamál
- Mentan og list
- Ferðslu og samferðslu
- Føroyar og framtíðin
- Løgting og løgtingsarbeiði





*Tað gongur rættiliga gott hjá føroyska flogfelagnum, Atlantic Airways.*

# Atlantic Airways flýgur enn hægri

**Atlantic Airways kann vísa á eitt yvirskot áljóðandi 10,2 mió fyri 2001. Hendingarnar 11. september hava ikki ávirkað ársúrslitið hjá flogfelagnum. Stórar íløgur liggja fyri framman, sigur Magni Arge**

ÁRSROKNSKAPUR
*Heri á Rógvi*

Atlantic Airways kann vísa á eitt gott úrslit fyri 2001. Á niðasta linju sæst, at 10,2 mió kr. eru til avlops. Hetta er sjeynda árið á rað, at Atlantic Airways kann vísa á eitt yvirskot. Tær 10,2 milliónirnar eru yvirskot, áðrenn skatturin er goldin. Atlantic Airways hevur enn so stórar avskrivingar, at teir ikki gjalda annan skatt enn 5 mió í eventual skatt. Umsetningurin vaks við 27% til 187 millónir kr. Fyrstu árini vóru heldur rak hjá føroyska flogfelagnum, men tú tykist gongdin at vera mikið sunnari hjá almenna flogfelagnum.

Eginognin hjá Atlantic Airways er nú komin upp á 95 milliónir, og hetta er ein hækking uppá 65 mió seinastu sjey árini.

Góða árið hjá Atlantic Airways í fjør staðfesti tað sunnu gongdini hjá føroyskum vinnulívið, har flest allar fyritøkur hava kunnað borðreitt við metstórum avlopum fyri farna árið.

Tað er eisini líkt til, at Atlantic Airways ikki hevur mist nakað stórvegis av 11. september. Áhugin hjá føroyingum at flúgva og øðrum at flúgva við føroyska flogfelagnum er eftir øllum at døma bara voksin.

– Vit hava merkt 11. september á tann hátt, at vit skulu gjalda meira í trygging, og vit merktu, at tað kom ein lítil kvøkkur á fólki um hetta mundi, men annars merktu vit ikki hetta á ferðafólki, sigur Magni Arge.

– Havandi broyttu umstøðurnar hjá flogferðsluni í huga, metur leiðsla felagsins úrslitið vera nøktandi. Felagið skal í komandi tíðum gera rættuliga stórar íløgur, og tí er eisini neyðugt, at felagið gevur eitt rakstraravlop, sum kann forrenta hesar íløgur, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways.

Magni Arge nevnir, at innan fimm ár skal Atlantic Airways hava útskift í øllum førum annað flogfari, og her er talan um eina stóra íløgu. Magni Arge vil tó ikki seta nakað tal á hetta. Í hesum sambandi kann tað eisini fáa týdning, hvussu støðan hjá flogvøllinum er tá, sigur Magni.

Eisini hevur oljuvinnan smitta av í roknskapinum hjá flogfelagnum. Talið av ferðafólki í 2001 var 98.000 móti teimum 90.000 árið frammanundan. Hetta er ein rættiliga stór hækking, sum ikki minst skyldast oljuvinnuni, tí Atlantic Airways hevur luttikið í tyrluflúgvingini til og frá boripallunum.

Í alt ferðaðust 158.056 fólk um flogvøllin í Vágum í 2001, og hetta er nógv meira enn árið frammanundan. Fyrstu mánaðirnar í ár hevur verið vøkstur í ferðafólkatali í mun til 2001, so gongdin tykist at halda fram.

Roknskapurin hjá Atlantic Airwyas skal leggjast fyri og samtykkjast av aðalfundinum, sum verður 19. apríl.

# Tvey nýggj frímerki







ÚTGÁVA
*Heri á Rógvi*

Postverk Føroya hevur gvið út tvey nýggj frímerki. Hesi avmynda listaverk hjá Tróndi Paturssoni. Útgávan er liður í felags norðurlendskari frímerkjaútgávu í sambandi við 50 ára dagin hjá Norðurlandaráðnum.

Triðja hvørt ár geva Norður lond frímerki út við einum felags evni. Á norðurlandafundi í Oslo í januar 2000 varð avgjørt, at frímerkjaútgávurnar í 2002, 2005 og 2008 skuldu hava høvuðsevnið: samtíðarlist (list aftaná 1945). Harumframt skuldi útgávan í 2002 snúgva seg um prýðing av almennum støðum (t.d. viðarlundum, á og í almennum bygningum, á gøtum og torgum). Útgávan skuldi eftir ætlan hava verið í 2001, men avgjørt varð at flyta hana til í ár, við tað at Norðurlandaráðið verður 50 ár.